# London Zoo



London Zoo er heimsins elsti vísundaligi djóragarður. Hann lat upp í London 27. apríl 1828, og var upprunaliga ætlaður at verða nýttur sum ein samling fyri vísundaligari kanningar. Hann lat tó upp fyri almenninginum í 1847. Í dag finst í garðinum ein samling av 704 ymsum djórasløgum við 16.802 djórum, og tað ger djóragarðin til ein hin største í Bretlandi. Hann verður rikin undir veingjunum av Zoological Society of London, grundlagt í 1826, og liggur í norðara parti av Regent's Park við Regent's Canal rennandi gjøgnum hann. ZSL hevur eisini ein størri garð í ZSL Whipsnade Zoo í Bedfordshire, har tey størru djórini so sum fílar og næsahorn eru flutt. London Zoo er ikki bert fyrsta vísundaligi djóragarðurin í heiminum, men eisini hin fyrsti sum lat upp eina slangudeild (1849), fyrsta almenna sjósavnið (1853), fyrstu flogkyknadeildina (1881) og fyrsta barnadjóragarðin (1938). London Zoo fær ongar almennar pengar, men lítir á felagsskapir, atgongumerkjasølu og sponsoratir til tess at fáa hjólini at mala runt. Tað sigur seg næstan sjálvt, at ein vitjan í London Zoo ikki eru burturspiltir pengar.


























